# Flytið ítróttarhøllina

*Somikið greið er áheitanin frá lærararáðnum í Hoyvíkar Skúla, sum halda ætlaðu plaseringina av nýggju ítróttahøllini í Hoyvík vera bæði misprýðandi og vandamikla. Enn hava lærararnir tó einki svar fingið*

Jákup Mørk

Lærarararáðið í Hoyvíkar Skúla hevur nú mótmælt ætlaðu gerðini av nýggju ítróttahøllini í Hoyvík.

Orsøkin til mótmælið er tó ikki, at nakar av lærarunum hevur nakað ímóti, at høllin verður bygd. Hinvegin er tað tann sannroynd, at lærararniongantíð eru kunnaðir í málinum, sum elvir til misnøgd, og harumfrmat meta teir, at ætlaða plaseringin av høllini er burtur úr vón og viti.

### Ongantíð kunnaðir

Heini Nygaard, sum er formaður í lærararáðnum í skúlanum, sigur við Sosialin, at tað, sum lærararnir serliga eru ónøgdir um, at teir á ongan hátt eru eftirspurdir ella kunnaðir í málinum.

- Sjálvandi høvdu vit hoyrt fólk tosað um, at høllin skuldi liggja har og har, men fyrsta formliga kunningin, sum vit hava fingið, var tá arbeiði at gera høllina varð boðið út, sigur Heini Nygaard.

Hann leggur eisini dent á, at tey sjálvandi ikki hava nakað sum helst ímóti ger av ítróttahøll í Hoyvík. Tvørturímóti eru tey sera fegin um hetta stigið, men eftir teirra fatan er arbeiðshátturin skeivur.

Heini leggur afturat, at tað nú eru lidnar tvær vikur, síðani ein áheitan um fund við Býráðið um málið varð send, men ikki er líkt til, at hetta letur seg gera. - Einasta vit higartil hava hoyrt, er ein telefonsamrøða, har greitt varð frá, at tað í løtuni ikki var gjørligt at fáa ein slíkan fund í lag, tí viðkomandi persónar vóru ikki tøkir.

### Skeiv plasering

Eisini eru lærararnir ónøgdir um, at høllin eftir ætlan skal byggjast framman fyri skúlan, ístaðin fyri at hon verður sett á økið í ein landnyrðing úr skúlanum, sum upprunaliga er ætlað sum ítróttaøki.

Tvinnar orsøkir eru til, at lærararnir ikki vilja hava høllina framman fyri skúlan. Onnur er, at um høllin verður bygd niðanfyri skúlan, fer henda avstað við øllum útsýninum, og hetta eru lærararnir sera harmir um. Sum er hava tey útsýn út yvir Nólsoyarfjørð, men hetta verður ístaðin skift út við veggin ella takið á nýggju høllini.

Hin orsøkin er, at eftir læraranna tykki, fer ein høll framman fyri skúlan at viðføra, at ferðslan, og harvið vandin hjá skúlabørnunum, verður nógv økt. Hetta tí venjingar vanliga byrja, tá børnini fáa frí úr skúla, og tí verður ein riðil av børnum, foreldrum og ítróttaíðkarum alt um eina leið, tá skúladagurin er lokin.

Spurdur um hetta ikki kann vera tað sama, tí ferðslan hevði kortini komið, um høllin varð bygd norðan- ella eystanfyri skúlan svarar Heini, at tað heldur hann ikki. Til hetta svarar hann, at varð høllin bygd á upprunaliga ætlaða staðnum, hevði borið til at gjørt veg uttan um skúlan til høllina, soleiðis at børn og bilar høvdu havt hvør sína farleið, og at vandin tí hevði verið nógv minni.

Vit royndu í gjár at fáa eina viðmerking frá tekniskudeild á býráðnum, men hetta eydnaðist okkum ikki áðrenn blaðið fór til prentingar.



# Balslev latið upp nethandil

*Mikudagin lat Balslev Timburhandil upp nýggja heimasíðu á internetinum. Umframt at verða kunning um felagið við søgu og upplýsingum um starvsfólk, er eisini talan um ein nethandil, har viðskiftafólkini — allar tíðir á degnum — kunnu bíleggja vørur*

Sum tann fyrsti av sínum slag í Føroyum hevur Balslevs Timburhandil fingið sær nethandil. Fyritøkan hevur, saman við ReproZ, gjørt eina sera tiltalandi og brúkaravinarliga heimasíðu, sum umframt nógv upplýsandi tilfar, eisini hevur ein nethandil.

Nethandilin hjá Balslevs Timburhandli man uttan iva vera tann størsti sum finst í Føroyum. Fyritøkan hevur nevniliga lagt øll vørunummrini út á internetið við vøruupplýsingum og myndum. Myndirnar eru kortini ikki allar komnar út enn, men higartil eru 6.000 myndir klárar til nýtslu.

### Keyp tá tú hevur stundir

Bent á Lava, stjóri hjá Balslev, sigur við Sosialin, at fyritøkan hevur arbeitt við hesi ætlan í umleið eitt ár. Ferð varð sett á arbeiðið í november, tá ein maður, varð settur at taka sær av uppgávuni burturav. Síðani hevur tað gingið skjótt.

- Nógv av viðskiftafólkum okkara hava spurt, um vit ikki fara at gera okkurt slíkt, og tá vit hildu, at tað var eitt skilagott hugskot, valdu vit at brúka pengar til tað, sigur hann.

Bent vísir á, at endamálið við heimasíðuni er, at røkka alsamt fleiri viðskiftafólkum, kring alt landið. - Besti mátin at gera hetta er við at brúka internetið, tí tá fær kundin møguleikan at fara inn í handilin, tá hann hevur stundir, og tað kann vera um dagin ella náttina, sigur Bent á Lava.

Og tað vónar Bent á Lava, at viðskiftafólkið fer at brúka.

Skipanin virkar soleiðis, at tá kundin, inni á netinum, bíleggur vøruna, so fer ordrin við teldupostinum til Balslev. Timburhandilin sendir so eina ordraváttan til kundan, so hann enn einaferð kann síggja, hvat hann hevur bílagt, og tá alt tað er liðugt, verður ordrin lagdur til avgreiðslu.

Um vøran skal koyrast út ella umkundin heintar vøruna sjálvur, er upp til hansara. Tað sigur hann tá hann bíleggur.

### Einki gjaldskort

Nethandilin hjá Balslev er kortini rættuliga nógv øðrvísi enn teir nethandlar, sum vanliga verða settir á stovn í hesum tíðum.

Hjá Balslev ber nevniliga ikki til at gjalda við FR/VISA kortið, men tað er tilvitað, greiðir Bent á Lava frá.

- Allarflestu viðskiftafólk okkara brúka nevniliga kontoskipanina, og tí er tørvurin ikki so stórur. Harafturat skal so havast í huga, at tað kemur fyri, at ávísar vørur ikki eru á goymslu, og tí er skilabetri at kundin rindar fyri vøruna, tá hann hevur fingið og sæð hana, sigur Bent.

Eitt annað, sum tey hjá Balslev, hava lagt stóran dent á, er tryggleikin. Hóast tað sigst vera trygt at handla við FR-kortið um internetið, so er tað kortini komið fyri aðrastaðni, at upplýsingarnar eru komnar øðrum í hendi, enn teimum tær vóru ætlaðar. — M. a. tí hava vit valt tann møguleikan frá, sigur Bent.

Men tað merkir ikki, at tað ikki kann koma upp á tal seinni, tí tað er lagt upp fyri møguleikanum í skipanini, so hon kann setast í verk uttan stórvegis hóvasták.

### Dagførast hvønn dag

Hjá føstu viðskiftafólkum Balslevs — teimum, sum hava internetsamband — er nýggja heimasíðan funnin fressur. Teimum nýtist ikki at fara frá arbeiði, um so er, at stundir ikki eru til tess, men nú kunnu tey sita heima, í frið og náðum, og bíleggja tað tey skulu brúka.

Føstu viðskiftafólkini, stórkundarnir, fáa brúkaranavn og loyniorð, soleiðis, at tey fáa atgongd til vøruskránna í øðrum formi, enn vanliga viðskiftafólki. Í hesum partinum av heimasíðuni hava tey møguleika at síggja um tey skylda pening, ella um tey eiga pening til góðar hjá Balslev.

Tað er nevniliga so, at nýggja heimasíðan koyrir saman við bókhaldsskipanini. Upplýsingarnar verða dagførdar úr fíggjarskipanini á heimasíðuna hvønn dag, og tað merkir, at tær upplýsingar, sum liggja á netinum, eru dagførdar.

Svend Åge Drewsen, sum er maðurin aftanfyri heimasíðuna, sigur at tað hevur stóran týdning fyri trúðvirði og nýtsluvirði, at upplýsingarnar eru tær nýggjastu.

- Tí fara vit at bera so í bandi, at vøruupplýsingarnar og líknandi, verða dagførdar hvønn dag, sigur Svend Åge.

Sum vera man, hevur Balslev eisini nýtt høvið til at kunna føroyingar um søguna hjá fyritøkuni. Hon er drúgv, tí tað eru skjótt hundrað ár, síðani fyritøkan sá dagsins ljós í Keypmannahavn.

Alt hetta ber til at lesa meira um á heimasíðuni, sum eitur http://www.balslev.fo.



Bent á Lava og Svend Åge Drewsen við skíggjan við heimasíðuni hjá Balslev


Bridgekapping

SMYRIL LINE

Tel 34 59 00

umborð á Norrönu

- á Danmarkarferðini 26. til 29. mai

Roydni bridgespælarin Per Kallsberg skipar fyri bridgekappingini!

Farið verður av Havnini fríggjamorgun kl. 8.30 og komið verður aftur mánamorgun kl. 6.00 !

úr bara 600,-

www.smyril-line.fo

e-mail: booking@smyril-line.fo

team 85 · 31 65 11




# Nýggja Idé Húsið komið upp

*Elementini til nýggja Idé Húsið komu til Føroya við Tango mánamorgunin. Veggirnir eru settir upp og eigararnir vænta at flyta inn til jólar*

Edvard Joensen

Tað gongur eftir ætlan at fáa nýggja Idé Húsið á Hálsi upp at standa. Og væntandi verður húsið liðugt um ársskiftið. Eigararnir vóna tó at kunna flyta inn kanska longu í oktober ella november, um tað gongur væl.

Nýggi bygningurin verður 4.000 fermetrar í tveimum hæddum. Niðara hæddin verður 2.100 fermetrar, og tann ovara verður 1.900 fermetrar, sigur Birgir Andreasen, sum arbeiðir hjá Idé Møblum.

Arbeiðið verður gjørt av bæði føroyingum og dønum. Elementini eru gjørd í Danmark, og danir seta tey upp, eins og danir fara at tekja bygningin. Byggifelagið Kanjon hevur gjørt jørð- og betonarbeiðið. Og føroyingar fara at leggja ljós og hita inn. Enn er ikki avgjørt, hvør tað verður, sigur Birgir Andreasen.

Tað eru 22 ár síðan Birgir Andreasen fekk »tann idé«, at hann skuldi byrja eina møblasølu í Havn. Síðan hevur hann saman við familjuni verið í tveimum húsum.

Nú er tað triðja húsið ávegis, hóast Birgir nú bara stendur sum vanligt starvsfólk hjá felagnum. Hann eigur saman við konuni Elsebeth fyritøkuna. Elsebeth Andreasen er stjóri.

Idé Møblar hava seinastu níggju árini hildið til í leigaðum hølum hjá Havnar Timburhandli á Hálsi í Havn. Har hava tey trivist væl. Men nú Timburhandilin skal brúka hølini til egið virksemi, vórðu tey noydd til at taka eina støðu, hvat gerast skuldi. Um tey skuldu leiga aðrastaðni, byggja nýtt ella gevast.

Hildið varð rættast at byggja nýggjan bygning á grundøki, tey áttu á Hálsi, og sum seinnu árini hevur verið leigað øðrum handlum í umráðnum til parkeringspláss. Hesin bygningurin fer eisini at liggja á slíkum støði kostnaðarliga, at leigan fer at at líkjast tí, tað annars hevði kostað at leiga aðrastaðni í býnum.

Birgir Andreasen sigur, at tað er við góðum vónum, tey fara undir hetta nýggja tiltakið. Tað hevur gingið væl at fáa fígging. Helvtin av kostnaðinum er eginogn, sigur hann, uttan tó at vilja nevna, hvussu nógv tað er í krónum og oyrum. Men sum skilst gongur grundstykkið inn í hesa eginognina, tí tey áttu stykkið, nú farið varð undir at byggja.

Og Birgir Andreasen leggur eina við, at hetta als ikki líkist tí, sum gekk fyri seg í áttatiárunum. Tá var alt bygt upp á lán og yvirfígging, sigur hann.



Eitt danskt felag hevur latið elementini og setir tey upp ( Mynd: Jens Kristian Vang)

# Teletænastan kappast nú við Føroya Tele

*Teletænastan á Eiði kann nú bjóða út fjarskiftistænastur í kapping við Føroya Tele. Hetta fer at merkja fjølbroyttari tænastuútboð og framhaldandi príslækkingar*

John Johannessen

Teletænastan á Eiði hevur júst gjørt avtalu við Føroya Tele um at nýta kervið hjá Føroya Tele til at veita fjarskiftistænastur í Føroyum.

Fyri vanliga brúkaran fer hetta at merkja fleiri valmøguleikar, fjølbroyttari tænastuútboð og helst eisini framhaldandi príslækkingar.

Hesum boðaðu Teletænastan og Føroya Tele frá í tíðindaskrivi í gjár.

Avtalan millum Teletænastuna og Føroya Tele er tann fyrsta av slag, ið gjørd er í Føroyum. Hon er úrslit av samráðingum gjøgnum eitt heilt ár. Seinasta árið hevur Fjarskiftiseftirlitið, sum myndugleiki, Teletænastan og aðrar fyritøkur, sum ynskja at royna seg á fjarskiftismarknaðinum, arbeitt við at fáa í lag samtrafikavtalur, og nú er hetta arbeiðið við at koma undir land.

Bæði Teletænastan og Føroya Tele fegnast um, at nú er komið til eitt úrslit. Eitt úrslit, sum báðir partar eru væl nøgdir við.

Teletænastan á Eiði fór longu í 1996 at bjóða út uttanlandstelefoni, og var fyritøkan eisini tann fyrsta í Føroyum, sum umframt Føroya Tele, fekk loyvi at bjóða út fjarskiftistænastur eftir at nýggja fjarskiftislógin kom í gildi.


-Góðir brúktir frá

REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| TOYOTA CAMRY 2,2 GL (Sýnaður 04-98) Skrás.: 02-04-98 Km.: 24.000 Prísur: 218.600,- Garanti** | TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA (Sýnaður 12-99) Skrás.: 11-04-95 Km.: 64.000 Prísur: 93.600,- Garanti* |
| TOYOTA CARINA 2,0 TDI Skrás.: 12-07-96 Km.: 78.000 Prísur: 142.600,- Garanti* | TOYOTA COROLLA 1,6 GSI SEDAN (Sýnaður 01-99) Skrás.: 22-10-91 Km.: 171.000 Prísur: 58.600,- |
| TOYOTA CARINA 2,0 GLI aut. gear Skrás.: 13-06-96 Km.: 82.000 Prísur: 127.600,- Garanti* | TOYOTA STARLET 1,3 XLI, 3 HURÐAR Skrás.: 30-09-97 Km.: 29.000 Prísur: 86.600,- Garanti** |
| TOYOTA CARINA 1,8 GLI Skrás.: 10-11-95 Km.: 90.000 Prísur: 120.600,- Garanti* | FORD ESCORT 1,8 T.DIESEL Skrás.: 07-08-98 Km.: 44.000 Prísur: 132.600,- Garanti* |
| TOYOTA CARINA 1,8 GLI (Sýnaður 12-99) Skrás.: 28-06-95 Km.: 70.000 Prísur: 119.600,- Garanti* | FORD ESCORT 1,8 DIESEL Skrás.: 01-06-95 Km.: 149.000 Prísur: 94.600,- Garanti* |
| TOYOTA CARINA 1,6 Skrás.: 27-04-95 Km.: 41.000 Prísur: 110.600,- Garanti* | TOYOTA CARINA 1,6 (Sýnaður 10-97) Skrás.: 10-05-95 Km.: 89.000 Prísur: 98.600,- Garanti* |
| TOYOTA CARINA 1,6 Skrás.: 30-07-90 Km.: 142.000 Prísur: 59.600,- | TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H/B (Sýnaður 02-00) Skrás.: 23-08-95 Km.: 80.000 Prísur: 93.600,- Garanti* |
| TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B Skrás.: 25-01-99 Km.: 21.000 Prísur: 136.600,- Garanti** | MITSUBISHI GALANT (Sýnaður 02-00) Skrás.: 12-06-91 Km.: 205.000 Prísur: 62.600,- |
| TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA Skrás.: 16-03-98 Km.: 50.000 Prísur: 122.600,- Garanti** | VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99) Skrás.: 25-05-90 Km.: 88.000 Prísur: 65.600,- |

| VØRUVOGNAR | AVHEINTINGARTILBOÐ |
|---|---|
| TOYOTA LANDCRUISER HJ61 Skrás.: 31-10-89 Km.: 137.000 Prísur: 105.600,- Garanti* | HONDA ACCORD (Sýnaður 06-99) Skrás.: 15-08-86 Km.: 214.000 Prísur: 4.600,- |
| TOYOTA PREVIA 2400 GLI (Sýnaður 03-98) Skrás.: 27-12-94 Km.: 58.000 Prísur: 98.600,- Garanti* | |
| TOYOTA HIACE 4x4 (Sýnaður 07-98) Skrás.: 19-10-87 Km.: 165.000 Prísur: 49.600,- | |

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE

Opi : M n.-fr . 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820